# AB nýggjan málmann




*Predrag Markovic og Andrass Drangastein, formaður í AB, eftir at sáttmálin við 34 ára gamla serban var komin upp á pláss í gjárkvøldið*

*Mynd: Terji S. Johansen*

**FÓTBÓLTUR** Í gjárkvøldið skrivaði AB undir eitt ára sáttmála við 34 ára gamla serban, Predrag Markovic, sum skal vera málverji á besta mansliðnum hjá AB hetta kappingarárið

Hilmar Jan Hansen

Predrag Markovic hevur frammanundan spælt við TB, Skála og B71, har hann hevur verið tvey ár á hvørjum stað. Nú skal hann komandi árið vera á Argjum, og tað passar honum eisini væl, tí kona hansara hevur arbeiðið í høvuðsstaðnum og bæði búgva í Havn.

Síðstu vikurnar hevur Predrag vant við AB, og burtur úr tí er nú komin sáttmálin, ið varð endaliga avgreiddur í gjárkvøldið. Sambært AB-heimasíðuna heldur hann, at AB hevur eitt ungt lið við stórum potentiali, og at hann gleðir seg at vera partur av hesum liðnum.

Umframt at verja málið hjá AB í 1. deild, skal Predrag Markovic eisini vera málmansvenjari hjá øllum málverjunum hjá felagnum í yngru deildunum.

– Tað er óføra gott fyri yngru málverjarnar, at vit hava fingið ein málmansvenjara burturav til teirra. Hetta er eitt stórt framstig fyri felagið, og verður gott fyri allar okkara málverjar, sigur Andrass Drangastein, formaður í AB, við heimasíðuna hjá felagnum.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Rógvi: Crewe er akkurát eg

**FÓTBÓLTUR** Rógvi Poulsen verður at síggja í enska felagnum, Crewe Alexandra, fram til í summar. Argjamaðurin letur væl at felagnum




*21 ára gamli argjamaðurin, Rógvi Poulsen, er fallin væl til í enska felagnum, Crewe Alexandra*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tróndur Arge

Rógvi Poulsen hevur síðstu tíðina vant við Crewe Alexandra, sum spælur í League Two, ið er fjórðbesta deildin í Onglandi. Nú tykist greitt, at Rógvi Poulsen fyribils heldur fram í felagnum til summar.

– Eg eri væl móttikin og fólkið kring felagið er sera fyrikomandi. Liðið spælir góðan fótbólt og hugurin at halda fram her er góður. Crewe er akkurát eg, sigur 21 ára gamli miðvallarin, sum er vaksin upp í AB, men seinnu árini hevur spælt við HB.

Eykaliðið hjá Crewe spældi í gjár venjingardyst ímóti Liverpool. Úrslitið gjørdist eitt tepurt 1-0 tap, men sjálvur spældi Rógvi ein góðan dyst og hevði onkrar góðar møguleikar. – Eg eri ongantíð nøgdur við míni egnu avrik, men eg haldi eg spældi nøkunlunda væl í dag, sigur hann.

Heimasíðan hjá Liverpool nevndi eisini tveir av møguleikunum hjá Rógva Poulsen, og somuleiðis visti hon at siga, at Liverpool-venjarin, Kenny Dalglish, var til dystin. Rógvi hevði tó ikki stundir at hyggja at áskoðarunum, meðan hann spældi, so hann segði seg ikki varnast at Kenny Dalglish var millum áskoðarnar.

– Eg skilji ikki ordiliga, hvussu vit taptu dystin, tí vit raktu stengurnar fýrar ferðir og brendu brotsspark. Omaná tað heila, so var málið hjá Liverpool sera heppið, sigur Rógvi Poulsen, sum fyribils bara hevur loyvi at spæla við eykaliðnum. Arbeitt verður við at fáa øll viðurskifti upp á pláss, so hann eisini kann spæla á besta liðnum.

*trondur@sosialurin.fo*

# Limirnir hefta ikki

**FÓTBÓLTUR** Nýggja útgávan av EB/Streymi, sum tekur yvir øll rættindi og allar skyldur hjá gamla EB/Streymi, hevur týðiliga tilskilað í viðtøkunum, at hvørki limir ella nevnd hefta persónliga fyri skyldur hjá felagnum

Hilmar Jan Hansen

Sunnukvøldið fór gamla felagsdeildin hjá EB og Streymi, EB/Streymur, í søguna, samstundis sum nýtt limafelag, ið eisini eitur EB/Streymur, varð sett á stovn. Síðani hevur dúgliga verið gitt um, at hetta kundi vera ein »bjargingarroynd«, eftir at EB/Streymur yvir tvey ár fekk tilsamans 5,25 milliónir krónur, ið stavaðu frá stuldri.

Eitt nú hevur verið róð framundir, at við at stovna eitt limafelag, kundu limirnir í nýggja felagnum leggja rygg til, skuldi rættarmálið ímóti fyrrverandi kassameistaranum í gamla EB/Streymi onkursvegna endað við avleiðingum fyri nýggja EB/Streym, ið jú hevur yvirtikið bæði skyldur og rættindi hjá gomlu felagsdeildini.

Men í grein 8 í viðtøkunum fyri nýggja EB/Streym verður hetta manað í jørðina, tí har stendur um heftilsi, at »limirnir ella nevndin hefta ikki persónliga fyri felagsins skyldum, men bert við sínum limagjaldi.«

## Ein formalitetur

Málið um fyrrverandi kassameistarin hjá EB/Streymi, ið sum bókhaldari í Formula stjól 5,25 milliónir krónur, ið hann flutti til EB/Streym, er eitt politimál og er ávegis í rættin. Rólant Højsted, ið var formaður í gamla EB/Streymi og eisini er formaður í nýggja EB/Streymi, vil ikki gera viðmerkingar til tað málið, men er annars fegin um nýggja limafelagið.

– Tað vísti seg, at fólkið stendur aftan fyri EB/Streym, tí vit vóru yvir 100 fólk á fundinum við Margáir sunnukvøldið, har tað einmælt varð samtykt at stovna nýggja limafelagið, sigur formaðurin, sum eftir stovnanina hevur eitt sindur av pappírsarbeiði at gera.

– Í dag ella í morgin senda vit Fótbóltssambandinum umsókn um at spæla í Vodafonedeildini í ár, og komandi aðalfundurin í Fótbóltssambandinum skal eisini góðkenna okkum sum lim. Tað plagar at vera ein formalitetur, og tað rokni eg eisini við, at tað verður hesa ferð.

At EB/Streymur fær limaskap í Fótbóltssambandinum, merkir samstundis, at EB og Streymur ikki longur vera limir har, tí tey einki meira hava við fótbólt at gera.

*hilmarjan@sosialurin.fo*